# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# HUGSA MEST OG BEST UM EGNAN BÚK

Tað er hugaligt at síggja, at okkurt veruliga er við at henda á pensjónsøkinum – at vit nú loksins fáa ein pensjónsreform, sum kann rudda upp í tí óskili, sum valdar á pensjónsøkinum, har so stórur og so grovur stættarmunur valdar.

Nú verður sagt, at vit øll skulu gjalda 15 prosent í eftirløn. Tey lægstløntu fara at fáa størsta vinningin, verður sagt, meðan tey vælbjargaðu skulu lata nakað av sínum framíhjárættindum.

Tað, sum hevur týdning er sjálvandi, at vit fáa eina skipan, sum tryggjar vælferðina hjá pensjónistum í framtíðini, og eina skipan, sum arbeiðandi fólkið megnar at gjalda. Tað var Hans Pauli Strøm, tingmaður Javnaðarfloksins, sum legði dent á, at við reforminum vinna tey lágløntu mest. Hann vísti á, at inntøkugrundarlagið hjá veikum pensjónistum verður styrkt, at misrøkta fólkapensjónin verður styrkt og dagførd, at mótrokning verður minkað, at skattafiggjaður fyrimunur hjá kapitalpensjónistum verður tikin av, og at samhaldsfesti í samlaðu pensjónsskipanini verður styrkt.

Okkurt bendir á, at Hans Pauli Strøm hevur serliga ringt eyga á kapitalpensjónini. Og rætt kann hann hava í tí. Hann tosar um, at *»fidusurin er, at tey vælbjargaðu hava fingið hinar skattgjaldararnar at gjalda ein stóran part av teirra pensjón, tí tey hava fingið ein skattafrádrátt«*. Hann sigur, at skattafiggjaði framíhjárættindini hjá vælbjargaðum skulu burtur, og soleiðis fáa láginntøkurnar mest burtur úr nýggju skipanini.

Sera áhugavert og góður javnaðarpolitikkur. Men Hans Pauli Strøm og øll hini í løgtinginum gloyma teir allar mest vælbjargaðu pensjónistarnar, sum eru tey sjálvi. Nú er tað løgtingið, sum smíðar lógir. Og eftir at fullveldislandsstýrið tók við í 1998 kom løgtingið til ta niðurstøðu, at lønirnar hjá politikarum skuldu hækkast mundandi og somuleiðis pensjónirnar.

Meðan vanlig fólk skulu brúka eitt heilt lív til at vinna sær eina pensjón, so tekur tað bara átta ár hjá einum landsstýrisfólki og 16 ár hjá einum tingfólki at vinna sær fulla feita



pensjón. Í ávísum førum kunnu tey eisini fara upp á pensjón, tá tey eru 60 ár. Tey fáa tænastumannapensjón. Tað merkir, at tað eru Palliba og Marsanna, sum gjalda pensjónsgjaldið. Og tað er høgt: Fyri tingfólk liggur tað um 25.000 krónur um mánaðin og fyri landsstýrisfólk um 75.000 krónur um mánaðin. Altso skuldu tey goldið sína pensjón sjálvi - eins og tey nú ætla at vit øll onnur skulu – so skuldu hesi tøl leggjast oman á lønina hvønn mánað fyri at fíggja teirra pensjón.

Altso: Politikarar hugsa fyrst og fremst um seg sjálvan. Tá javnast skal - og javnast skal niðureftir, so spæla politikararnir ikki sjálvir við, tá eru tað bara hini, sum skulu vera samhaldsføst. Ei undur í, at fólk troyttast av sjálvfeitum politikarum...

**» Eitt landsstýrisfólk kostar 75.000 um mánaðin í pensjón**

## Tá Vestergaard sigur nei...



...so verður tað nei. Tað vita vit øll longu frammanundan, og so kunnu øll í uttanlandsnevndini, fólkafloksfólk, fyrrverandi fólkafloksfólk ella ikki-fólkafloksfólk siga og halda hvat tey vilja.

Tey vóru øll so fegin í gjár, og Høgni Hoydal fegnaðist í sjónvarpinum um søguliga semju um makrelin, tí ein samd nevnd uttan um Fólkaflokkin og Poul Michelsen sigur, at Jacob Vestergaard skal selja 60.000 tons av teimum 150.000 tonsunum til hægstbjóðandi.

– Endiliga hava vit fingið sett hol á málið um eina tilfeingisbúð, og endiliga fáa vit lumpað eitt tilfeingisgjald ígjøgnum uttan um Fólkaflokkin.

Men gloymið alt um hatta. So frægur stirðil er ikki í løgtinginum, at tey fara at taka eitt so stórt stig uttan um flokkin, sum stýrir fiskivinnuni. Tjóðveldi, Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin tora ikki at leggja á annan bógv, enn fólkafloksbógvin, og harvið verður tað. Fólkaflokkurin ræður eina í fiskivinnumálinum. Fólkaflokkurin handlar, hini bara snakka...

## Umsita almennar pengar illa

Í sambandi við roknskapin hjá Smyril Line er komið fram, at frákoyrdi stjórin kostaði felagnum 2,4 milliónir krónur í fjør. Upplýst verður ikki, hvussu stórur partur er løn og hvussu stórur partur er fráfaringarløn. Men stjórin varð koyrdur frá í juni, so ein stórur partur má vera fráfaringarløn.

Fyri tveimum árum síðani stóð Smyril Line á eggini til húsagang. Tað almenna setti 30 milliónir krónur í felagið, sum varð bjargað. Altso 30 almennar milliónir krónur bjargaðu felagnum.

Nú er tað so, at landssttýrið eigur meirlutan í felagnum, partvís beinleiðis og partvís ígjøgnum Framtaksgrunn Føroya. Taka vit partin hjá TF Holding, sum fólkið í Føroyum eigur, so eigur tað almenna 78,7 prosent av felagnum.

Tí er tað ótruligt, av Vinnumálaráðið umstir almennar pengar so illa. At tað ber til hjá einum partafelag, sum tað almenna eigur, at geva stjóranum næstan 10 prosent av almennaru kreppuhjálpini, tað er í besta lagið idiotiskt.

Áhugavert hevði verið at fingið at vitað, hvussu Smyril Line hevur brúkt hin partin av teimum 30 milliónunum – og um Vinnumálaráðið í heila tikið hevur ánilsi fyri, hvussu kreppuhjálpin verður brúkt. Er tað so galið, at almenna skipanin bara er for rotin...?



**» Viðini skapt í Norðoyggjum**

GUNVÁ VIÐ KELDU
KJAK Á SÍÐU 14



**» Trý smá sjúkrahús**

ÓLI MIKKELSEN
KJAK Á SÍÐU 14



## Føroyskar reality-stjørnur á Hvonn Live

Kringvarp Føroya hevur við sendirøðini Fólksins Rødd rættiliga sett meiniga føroyingin í fokus. Í sendingunum siga fólk kring landið siga sína hugsan um ymisk evni, og tað er bæði hugvekjandi og undirhaldandi.

Leygarkvøldið verða trý av fólkunum í sendirøðini hjá Kringvarpinum gestir í sendingini Hvonn Live á Rás2. Tosað verður við havnamannin Inga Sørensen, klaksvíkingin Sonhard Johannesen og Sumbiarbóndan Arnfríð Hentze um, hvussu tað er at verða røddin hjá fólkinum, og um hvussu tað er at blíva kend kring landið.

Í Hvonn Live hesaferð vitjar eisini danski rithøvundin Cammilla Rysgaard, sum hevur skrivað bók um at sjálvsvirði og gevur góð ráð um, hvussu fólk kunnu sleppa undan at stúra og heldur hugsa positivar tankar um seg sjálvan.

Hallur Joensen og dóttirin Jessica leggja eisini leiðina framvið og fara at spæla live í sendingini.

Hvonn Live verður leygarkvøldið kl. 20 til 22. Fólk eru vælkomin á Hvonn at fylgja sendingini, og annars ber eisini til at hoyra alt á Rás2.



**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*